Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 8 |
| Tíð: | 17-08-23 klokkan 13.00 – 15.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur. Julianna Klett hevði forfall.

**Fundarskrá:**

1. Eldradagurin 2023
2. Ársfundur hjá Landsfelag Pensjónista
3. Ymiskt

AD 1 Eldradagurin 2023

Vit avgjørdu á seinasta fundi, at Eldradagurin skuldi vera fríggjadagin 20. oktober. Katrin boðaði frá, at tað ikki liggur fyri hjá henni at luttaka henda dagin. Tí varð tosað, um tað var skilagott at finna ein annan dag til tiltakið. Annars hevur Dansifrøi játtað okkum høli til 20. oktober, og somuleiðis hevur dugnaligur kokkur játtað at matgera til dagin.

Avgjørt varð, at vit á komandi fundi skuldu finna endaliga dagfesting fyri, nær dagurin skal haldast.

Skráin fyri dagin er enn tann sama:

**”Hvat kann TK gera fyri at bøta um korini hjá eldri borgarum, sum ikki eru røktarkrevjandi”.**

Arbeitt verður framvegis við at fáa nøktandi serfrøði at koma við íkøstum til dagin, og at fáa ein royndan fundarstjóra at stýra degnum. Umboð fyri kommununa verða boðin við og somuleiðis landspolitikkarar.

AD 2 Ársfundur hjá Landsfelag Pensjónista

Eldrarráðið verður umboðað á Ársfundinum. Limir og eykalimir hava fingið tilboð um at koma við. Luttøkugjaldið verður goldið av Eldraráðnum.

AD 3 Ymiskt

At enda var dúgliga prátað um inntøkuregulering av fólkapensjónini. Hon er avskaffað í Danmark, og tað hevur viðført munandi inntøkuvøkstur og harvið størri skattainntøkur. Vit halda, at tað sama hevði hent, um inntøkureguleringin var avskaffað her hjá okkkum. Tað hoyrdist í miðlunum, at hetta

fer at kosta Landskassanum 200 milliónir. Okkum lysti at vita, hvussu man er komin fram til hesa upphædd.

Í Føroyum táttar talið av fólkapensjónistum upp móti 10.000. Av hesum liggur talið av pensjónistum 67-79 ár omanfyri 6000.

Landið skríggjar eftir arbeiðismegi. Tó lata vit almennan stuðul til sjófólk, til fólk, sum arbeiða uttanlands, enntá til fólk í fiskivinnuni á landi, har arbeiðisgevarin átti at rinda. Eisini til fólk, sum leiga út býli og til tey, sum keypa el-bilar, o. s. fr. Einasti bólkur, sum verður straffaður fyri at náa eina inntøku, sum gevur mat í munnin, klæði uppá kroppin og tak yvir høvdið - tí tað gevur fólkapensjón ikki - eru pensjónistarnar.

Komandi fundur verður í Tilhaldinum hósdagin 7. september 2023 klokkan 13.

Fundur lokin klokkan 15.00.

Tórshavn 20-08-2023

Petur Rouch,
skrivari